

# Konsert við Havnar Hornorkestri

TÍÐINDASKRIV
*frá Havnar Hornorkestri*

Leygardagin 20. september klokkan 16 fer Havnar Hornorkestur at hava konsert í høllini á Læraraskúlanum í Havn.

Hetta er tann fimta konsertin í sambandi við, at Havnar Hornorkestur í ár verður 100 ár. Sjálvur føðingardagurin hjá orkestrinum var 13. februar, men jubileumskonsertirnar byrjaðu longu í fjør heyst, tá skotska hornorkestrið Newtongrange Silver Band vitjaði Havnar Hornorkestur, og bæði orkestrini hildu eina stóra konsert í Norðurlandahúsinum.

Síðani hevur Havnar Hornorkestur hildið fleiri aðrar jubileumskonsertir, tildømis við vitjan av kenda trompetspælaranum John Wallace.

Orkestrið heldur kortini fram at hátíðarhalda hendan runda føðingardagin, og næsta tiltakið á skránni er sum sagt konsert á Læraraskúlanum nú leygardagin kl. 16. Eisini til hesa konsertina hevur orkestrið fingið vitjan uttanlands. Tað er svenski trompetspælarin Anders Nyquist. Anders hevur verið í Føroyum fyrr, tá hann spældi saman við eini messingkvintett, sum eisini Andras Olsen spældi við í. Anders fer millum annað at spæla eina Slaviska Fantasi av tónaskaldinum Carl Höhne saman við orkestrinum. Eisini Andras Olsen, sum er uppvaksin í Havnar Hornorkestri og sum hevur fingið útbúgving bæði í Danmark og Onglandi, fer at spæla solo saman við orkestrinum. Hann fer at spæla eitt verk av Eric Cook, sum kallas Bolivar, og eitt lag hjá Andrew Lloyd Webber, sum eitur As If We Never Said Goodbye.

Skráin annars til konsertina verður sum vant fjølbroytt. Har verður bæði léttari og meira seriøsur tónleikur - tildømis ein syrpa av Beatles-løgum og ein suita fyri hornorkestur av eingilska tónaskaldinum Malcolm Arnold.

Konsertin verður væntandi ein góðan tíma til longdar, og hon verður í Læraraskúlahøllini leygardagin kl. 16.


www.sosialurin.fo

VARPIÐ
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna
Skráir og ummælir
Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá TV • Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ DK 4 • TV 1000 • TV3 dk • Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel Euro Sport • MTV • National Geographic • TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2





Frá Havna-grillini
Pizzamatskrá

| | | |
|---|---|---|
| 01. | Tomatsós, ost | 50.- |
| 02. | Tomatsós, ost, skinka, ananas | 55.- |
| 03. | Tomatsós, ost, oksakjøt, leyk | 55.- |
| 04. | Tomatsós, ost, pepperoni, piparfrukt | 55.- |
| 05. | Tomatsós, ost, skinka, bacon, pepperoni | 70.- |
| 06. | Tomatsós, ost, rækjur, soppar, mais | 70.- |
| 07. | Tomatsós, ost, skinka, rækjur, hvítleyk (samanbakað) | 75.- |
| 08. | Tomatsós, ost, oksakjøt, pepperoni, bacon, leyk piparfrugt | 75.- |
| 09. | Tomatsós, ost, tun, soppar, reiðir, jalapenos | 80.- |
| 10. | Tomatsós, ost, kebabkjøt, chili, hvítleyk, jalapenos | 72.- |
| 11. | Tomatsós, ost, pepperoni, jalapenos, bacon | 65.- |
| 12. | Tomatsós, ost, oksakjøt, skinka, pepperoni, bacon | 75.- |

Eyka kostar: Ananas, leykur, soppar, piparfrukt, jalapenos, ostur 7.-
Pepperoni, bacon 8.-
Oksakjøt, skinka, tun, rækjur, kebabkjøt 10.-

Havnagrillin · Miðvágur · tel 33 38 48
Opið er allar dagar frá kl. 17.00

VØRUMESSUBLAÐIÐ
sum vit ætlaðu skuldi
í mikudagsblaðið
er flutt til
Fríggjadagin 19. september

Argjavegur 26 · tel 34 18 00 · fax 34 18 01 · e-mail: post@sosialurin.fo
Sosialurin

Felagið TÓRSHØLL
Í vikuskiftinum spæla
Juliannu boys
• Leygarkvøldið kl. 19.30 – Nátaveitsla
- seinasta freist at tekna seg, er í kvøld

AUTO
-Dag & nátt-
-Alt døgnið-
Vilt tú bil hýra - ring 311234
Nú fáast eisini Talutíðarkkort
Føroya Tele Kall
BENZIN
DIESEL
KIOSK
AUTO
311234

FRÍGGJAKVØLDIÐ
Stjerne for en aften-kvøld!
Jens Marni & Kim unplugged
"hoyr Jens Marna syngja Desperado"
KONUFÓLK ÓKEYPIS ATGONGD ÁÐRENN KL. 01:00
OPIÐ FRÁ KL. 23:00 - 04:00
LEYGARKVØLDIÐ
8 av teimum BESTU føroysku DJ'unum á einum stað!
"alt tað besta frá 70-, 80-, 90'unum, og tað nýggjasta nýggja"
OPIÐ FRÁ KL. 23:00 - 04:00
- 20 ára aldursmark -
PLATFORM
discoteque
VINN EINA FERÐ VÁGAR - KEYPMANNAHAVN T/R
INNI Á WWW.PLATFORM.FO
MAERSK AIR

club KAGGIN
Hóskvøldið spælir
Headache Blues Treo
Ókeypis atgongd • double up kl. 21.00-22.00
Fríggjakvøldið spælir
BASALT
Serligt tilboð í barrini kl. 23.00 – 00.30
Leygarkvøldið spælir
BASALT
Serligt tilboð í barrini kl. 23.00 – 00.30
www.kaggin.fo

fk Matseðilin
Hósdagin 18. sept:
Minutbúffur
Fríggjadagin 19. sept:
Karponadir
Leygardagin 20. sept:
Oksasteik
Mánadagin 22. sept:
Kjøtfrikadellir
Týsdagin 23. sept:
Høsnarungi
Mikudagin 24. sept:
Roykt medistarpylsa
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 22,00
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 30,00
Matstovan í Hoyvík

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
*Koyrt verður leygarkvøld:*
Vágaleiðin *(tlf. 217753)*
• Úr Vágunum — *bert eftir avtalu*
• Tórshavn - Vágar — kl. 04.30
Vestmannaleiðin *(tlf. 217752)*
• Vestmanna - Tórshavn — kl. 23.30
• Tórshavn - Vestmanna — kl. 00.30
• Vestmanna - Tórshavn — kl. 03.30
• Tórshavn - Vestmanna — kl. 04.30
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð eftir avtalu)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254

BÍLEGG PIZZA
FRÍGGJANÁTT
OG
LEYGARNÁTT
HEIMKOYRING ALLA NÁTTINA
PIZZA 67
TEL. 35 67 67

Øll hava eina góða síðu
– pop.fo hevur 100